inni



## Handilsbygningur – Heiðavegur, Saltangará

Ognin er ein handilsbygningur (Stokkastovan). Húsini eru í 2 hæddum – hvør hæddin 352 m² – í alt 704 m². Byggiár: 1976. Niðara hæddin verður útleiga til handilsvirksemi. Í niðaru hædd er stórt handilshøli, køkur, skrivstova, wc, goymslurúm og bryggers / fýrrúm. Ovara hædd er í ferð við at verða gjørd heilt av nýggjum. Bygningurin verður seldur samlaður, ella niðara hædd fyri seg og ovara hædd fyri seg. Bygningurin liggur sera væl fyri mitt í býnum. Tað er millum annað møguleiki at gera 4 íbúðir í ovaru hædd á umleið 88 m² hvør. Hesar kunnu gerast lyklaklárar um áhugi er fyri tí. So lat okkum frætt frá tær, um áhugi er.



## Vinnubygn. – Kajøkið, við Trøllaklett, Søldarfj.

Vinnubygningur á kajøkjinum í Søldafirði. Bygningurin er í einari hædd – í alt 120 m². Har er eitt stórt høli á umleið 80 m², skrivstova / køkur, skiftirúm og wc. Grundøkið er 600 m². Byggiár: 1980. Bygningurin kann útbyggjast til tað dupulta. Við bygninginum fylgir loyvi til at flyta út feskan fisk og hummara. Við bygninginum fylgir eisini ein elektriskur trukkur, ein lastvognur, 2 bingjur og 400 fiskakassar á 70 kg. Bygningurin er eisini væl egnaður at nýta til onnur endamál so sum smiðu, goymslurúm o.s.fr. Uttanumøkið er asfalterað. Bygningurin stendur sera væl fyri, er lætt atkomuligur fyri stór akfør. Bygningurin er í góðum standi og er bygdur av bjálvaðum betong elementum.

**Prísuppskot : 1.900.000,00 kr.**



## Vinnubygningur – Rituvíkshálsur, Nes

Stórur vinnubygningur á Rituvíkshálsi. Bygningurin er í einari hædd við innskotum dekki í parti av bygninginum. Veghæddin er 893 m² og innskotnað dekkið er 587 m². Samlaða gólvíddin er 1.480 m². Grundøkið er 5.209 m². Byggiár: 2002. Høllin er væl egnað til vørugoymslu, handil og annað vinnuligt virksemi. Eisini er møguleiki fyri at byggja út upp til 3000 m². Afturat goymslurúminum er fýrrúm og wc. Frá veghæddini er galvaniserað stáltrappa upp til innskotnað dekkið. Alt uttanumøkið er javnað og asfalterað. Kring alt økið er uppsett stik við stálsúlum og galvaniseraðum stáli. Bygningurin stendur sera væl fyri og er lætt atkomuligur við stórum akførum. Bygningurin er í sera góðum standi og krevur ongar ábøtur. Ognin hevur ein trý ára leigusáttmála. Verður seld um hóskandi boð fæst.



## Stórt grundøki – Argjabogagøta 38, Argir

Ognin er eitt stórt jarðarstykki á uml. 3.460 m² í C 3 miðstaðarøki. Loyvt er at byggja randarhús / tvíhús / íbúðarblokkar og bygningar til tænastuvinnu / handil. Ognin, ið liggur úti á Argjaboða, liggur væl fyri við sera góðum útsýni út á fjørðin.



## Virkisbygningur – Marknagilsv. 86, Tórshavn

Virkisbygningur við íbúð. Ognin er 4 størri og smærri goymslu- og framleiðslubygningar við gólvvídd á í alt 1.126 m². Grundøkið er 3.753 m². Byggiár: uml. 1967. Høvuðshøllin er 32x14=452 m². Loftshæddin í niðaru hædd er 3,8 m. Har er arbeiðsrúm, skrivstova, blandirúm og atgongd til sproytukabinu, trappa til kjallahædd, trappa til umsiting á ovaru hædd og trappa til íbúð við egnari inngongd. Í ovaru hædd er umsiting uml. 40 m² og íbúð á uml. 60 m². Í íbúðini er gongd, køkur, stova kamar og baðirúm. Umsitingin hevur skrivstovu, matstovu við tekøki, skiftirúm og wc. Kjallarahæddin er 182 m² og hæddin 1,98 m. Har er fýrrúm og goymsla. Sproytukabinan er uml. 7x6,5=47m². Síðuhøllin er 25,4x11,3=287 m². Hæddin er 5m undir mønuni. Hartil er tilbygningur í 2 hæddum á 7,65x3,90=30 m² - í alt um 60 m². Her er hæddin 6 m. Síðuhøllin er høvuðsumvæld í 2002. Alt uttanumøkið er planerað og partvíst asfalterað. Ognin liggur sera væl fyri í náttúruvøkrum umhvørvi nær býnum við ringvegin í A1 øki og hevur sera gott útsýni. Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.



## Vinnubygn. – Stoksoyrarvegur 10, Klaksvík

Bygningurin er í 3 hæddum. Niðasta hædd og miðhæddin er um 1000 m² hvør (uttara mát), og ovasta hædd er um 400 m² - í alt uml. 2.400 m². Grundøkið er 3.079 m². Annar parturin er bygdur í 1930'unum og hin í 1950'unum. Bygningurin var fram til 1997 brúktur til fiskavirking, og síðani er hann brúktur til goymslu. Byggisamtyktin er nú broytt, so tú kanst brúka bygningin og økið til m.a. trivnaðar-, mentannar-, tænastu-, handils- og matstovuvirksemi og til umsiting. Møguleiki er fyri at gera innkoyring frá Stoksoyrarvegnum. Ognin verður seldur um hóskandi boð fæst.



## Virkisgrund – Húsagarður, Syðrugøta

Talan er um eina ogn í Syðrugøtu, sum er ein stoypt grund á 209 m², ið stendur oman ímóti sjóarmálanum. Grundin er stoypt í 1950-unum og grundøkið er 607 m². Loyvt er at byggja vinnubygning oman á grundina. Tekningar eru tøkar.



## Trøð til grundstykki – Kollafjørður

Ognin er eitt stórt jarðarstykki / trøð innangarðs á uml. 10.520 m² Norðuri í Sundum, Kollafjørður. Ognin, ið er væl egnað til grundstykki, liggur sera væl fyri í náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi við sera góðum útsýni og atgongd til veg. Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.



## Handils- / skrivstovuhøli – til leigu

Talan er um niðastu hædd í bygninginum Yviri við Strond 3, Tórshavn – í alt 214 m². Hølini eru væl egnað til handil ella til skrivstovu. Har eru 2 stór rúm, 3 smærri rúm, køkur, wc og fýrrúm. Hølini eru væl útgjørd við øllum nútímans el- og it-innleggingum. Eisini er no-break anlegg. Hølini liggja sera væl fyri við høvuðsveg, og inngongd er beint inn frá vegnum. Nøkur p-pláss eru við í leigumálinum.

P/F Inni Tórshavn Tel 354200 Fax 354201 Niels Finsensgøta 37 Postboks 364 FO-110 Tórshavn

inni